# Lýsing eftir skrivara til Føroyagrunnin frá 1971

**Grunnurin søkir eftir royndum skrivara** at taka sær av virksemi grunnsins.

Virksemið hjá grunninum er vorðið so stórt, at grunnurin søkir eftir skrivara at taka sær av virkseminum. Uppgávurnar eru:

- **Viðgerð av umsóknum**
- **Uppfylging av íløgum**
- **Røkt av gjaldføri o.t.**
- **Fyrireiking av fundum**
- **Skrivari hjá nevndini**

Vit rokna við, at tú hevur fyrisitingarligar royndir og royndir á økinum, sum grunnurin virkar á e.t. Umsøkjarar, sum hava hægri útbúgving, hava fyrimun.

Starvið hevur ikki nakra skipaða arbeiðstíð, og roknað verður við, at tú brúkar 15 tímar um mánaðin.

Um tú hevur spurningar til starvið, so kanst tú tosa við Maritu Rasmussen tel 239909.

Løn sambært avtalu.

**Umsóknarfreistin** er 4. juni 2007.

Umsóknir skulu sendast til:
Føroyagrunnin frá 1971
Boks 158
700 Klaksvík

Um Føroyagrunnin frá 1971 – Endamáls grunnsins er: At eiga partapening í JFK, Veita stuðul til lesandi innan fiskivinnu, Seta á stovn og eiga vinnurekandi partafeløg

DIMMALÆTTING 341200

Starvslýsing

Barnatænastan

## Heilsufrøðingur

Barnatænastan søkir eftir heilsufrøðingi. Talan er um eitt hálvtíðarstarv, sum verður sett sum skjótast ella eftir nærri avtalu.

Starvið fevnir um samansett virksemi við tænastu til barnafamiljur og skúlar í økinum. Stórur dentur verður lagdur á tvørfakligt samstarv.

**Førleika:**
- Útbúgving sum heilsufrøðingur.
- Royndir frá heilsufremjandi arbeiði á barna- og familjuøkinum eru ein fyrimunur.
- Áhugi fyri fakligari menning.
- Arbeiðið er skipað í samstarvstoymir, og tað er tí ein fyritreyt, at tú hevur góð samstarvsevni og kann viðvirka til at menna kollegiala samstarvið.

**Vit bjóða:**
- Sjálvstøðugt, spennandi og til tíðir krevjandi arbeiði.
- Fakliga menning og supervisión.
- Tú verður partur av einum samstarvstoymi við positivum og engageraðum starvsfeløgum. Væntast kunnu broytingar í mun til raðfestingar og mannagongdir í samband við menningarverkætlan.

**Setanartreytir:**
Løn sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið er Nærverkið. Tænastustaðið er í løtuni Barnatænastan í Eysturoynni, men um neyðugt kann talan seinni verða um flyting til annað øki.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, ert tú vælkomin at ringja til Barnatænastuna á tel. 354010.

**Umsókn:**
Umsókn skal sendast til:

Barnatænastan
Niels Finsensgøta 28, 2. hædd,
Postboks 132
FO-110 Tórshavn
Stílað: Minna Poulsen, virkandi leiðari

**Umsóknarfreist: 15. juni 2007**

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

**www.naerverk.fo**






# Stuðul til uppihaldspening

Umsókn um stuðul til uppihaldspening fyri fyrra hálvár 2007 saman við kvittanum fyri goldið barnagjald, skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 04.06.2007. Kvittanir skulu eisini vísa, til hvønn barnagjaldið er goldið. Um goldið er til Toll- og Skattstovu Føroya, er ikki neyðugt at lata inn kvittanir.

Umsóknir, sum eru Almannastovuni í hendi innan nevndu freist, verða avgreiddar í juni 2007. Sambært lóg um stuðul til uppihaldspening verður stuðulin útgoldin seinast í juni og desember og verða umsóknir, sum verða móttiknar aftaná 04.06.2007 ikki avgreiddar fyrr enn í desember 2007.

Verður søkt fyrstu ferð, skal avrit av gjaldsavgerð um barnagjald/-gjøld ella hjúnamakagjald frá Ríkisumboðnum ella samsvarandi útlendskum myndugleika sendast inn saman við umsóknini.

Umsóknarbløð kunnu heintast á heimasíðuni www.almannastovan.fo undir teiginum oyðibløð og fáast við at venda sær til økisdeildirnar.

## Almannastovan

**Økisdeildin í Tórshavn**
Tinghúsvegur 14
100 Tórshavn
tlf. 35 35 70 – fax 35 35 71

**Økisdeildin í Norðoyggjum**
Klaksvíksvegur 78A
700 Klaksvík
tlf. 45 72 40 – fax 45 72 41

**Økisdeildin í Eysturoy**
Heiðavegur
620 Runavík
tlf. 47 47 10 – fax 47 47 11

**Økisdeildin í Suðuroy**
800 Tvøroyri
tlf. 35 35 60 – fax 35 35 61

Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Varaleiðari til Bústovnin og Sambýlini í Runavík

Vit søkja eftir varaleiðara til Bústovnin og Sambýlini í Runavík til setan 1. juli 2007 ella eftir nærri avtalu.

**Vit sóknast eftir einum starvsfólki, sum:**
- hevur lokið námsfrøðiligt prógv ella líknandi prógv
- hevur góð samstarvsevni
- hevur hug og hegni at fyrisita og leiða,
- kann átaka sær nýggjar avbjóðingar/ broytingar
- hevur royndir og kunnleika innan økið
- hevur vilja og evni at samstarva við búfólk, avvarðandi, starvsfólk og leiðslu
- hevur hugflog at síggja møguleikar fram um forðingar
- kann seta greiðar linjur
- hevur teldukunnleika,
- er førur fyri at yvirtaka leiðarans uppgávur, tá hesin er burturstaddur.

**Setanartreytir:**
Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er í løtuni í Trivnaðartænastuni. Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya pedagogfelag. Um pedagogur, ið frammanundan er tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Oddfríðu Højgaard, leiðara, á telefon 226121.

**Umsókn:**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

Bústovnin og Sambýlini
Rúnarvegur 6
620 Runavík.
Stílað: Oddfríða Højgaard

**Umsóknarfreist: 11. juni 2007**

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

**www.naerverk.fo**